

*Birita Mohr varð í gjár heiðrað við Ársins Herðaklappi, sum á hvørjum ári verður latið sjónleikara ella felag fyri serligt avrik. Umframt langa listan yvir avrik seinastu 30 árini, gjørdi leikluturin sum Olga, ið Birita Mohr leikti í Nordost, serliga ávirkan á dómsnevndina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Leikari heiðraður fyri 30 ár í tænastu

**Birita Mohr var á samkomu í Hans Andriasarhúsi í Havn heiðrað fyri 30 ár sum sjónleikari. CV'ið er rúgvismikið, men serliga var tað leikluturin sum Olga í Nordost, ið sannførdi dómsnevndina um, at Birita Mohr var tann rætta at heiðra við herðaklappinum í ár. Birita er ein fyrimynd, ein eldsál og ein rørandi Olga, varð sagt**

LEIKLIST
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í gjár varð Ársins Herðaklapp latið sjónleikara fyri serligt avrik. Herðaklappið verður latið á hvørjum ári, og eru tað nevndirnar í Tjóðpalli Føroya og MáF, ið lata viðurkenningina. Ætlanin við Ársins Herðaklappi er at heiðrað sjónleikinum, og tað arbeiðið, ið liggur aftanfyri. Á Grækarismessu á hvørjum ári síðan 2001 hevur Ársins Herðklapp verið latið. Tey, sum áður hava fingið Ársins Herðaklapp, eru Lina Larsen, Hans Tórgarð, Hjørdis Johansen, Adelborg Linklett, Bárður Persson, Jytte Joensen og Eyð Matras.

Í gjár kundi Birita Mohr melda seg upp í hetta kórið. Hon var á samkomu í Hans Andriasarhúsið Undir Pisuvarða í gjár heiðrað við sjónleikaraviðurkenningini.

Dómsnevndin er mannað við Dagny Joensen, Dánjal Joensen og Karin Kjølbro. Tey høvdu avgjørt at lata Ársins Herðaklapp til Biritu Mohr, sjónleikara, fyri trúgva tænastu sum sjónleikari. 56 ára gamla Birita Mohr hevur ein langan avrikslista eftir 30 ár á palli. Hon varð frá byrjan næmingur hjá Eyðuni Johannesen, sum eitt skifti var stjóri í Sjónleikarhúsinum í 1960-70 árunum. Hon var partur av leikbólkinum Gríma, sum varð stovnaður í 1977, og sum seinni varð til Tjóðpallur Føroya. Og har er hon enn.

Birita Mohr var tann fysta í næsta ættarliðnum av sjónleikarum, ið fór at útbúgva seg innan sjónleik, næst eftir Eyðun Johannesen, tá hon í 1980 fór undir sína sjónleikaraútbúgving. Hana fekk hon á Leiklistarskóla Íslands í 1984. Síðan hon kom heim, hevur hon verið virkin bæði sum sjónleikari og leikstjóri innan føroyskan sjónleik, sjónvarpssendingar, umframt at leggja røddir til føroyskar barnasendingar.

### Ein fyrimynd, eldsál og ein rørandi Olga

Sum dómsnevndin segði, er avrikslistin hjá Biritu Mohr so mikið drúgvur, at tað er ógjørligt at nevna allar teir leikir, hon hevur verið við í. Nevnt var kortini, at dómsnevndin virðismetti, at tað var Birita Mohr, ið tók stig til at savna ungu sjónleikararnar, tá teir í 1980-90-árunum komu heim eftir lokna útbúgving, og tók stig til at fremja dygdargóðan yrkisleik í Føroyum.

Somuleiðis segði dómsnevndin, at Birita Mohr hevur verið við til at menna leiklistina, bæði tøkniliga og listarliga, og at tað hevur gjørt hana til fyrimynd fyri yngri sjónleikarar.

"Birita Mohr hevur stutt sagt verið tann eldsálin, sum yrkissjónleikur í Føroyum so harðliga hevur fyri neyðini, fyri at yvirliva", segði dómsnevndin.

Umframt omanfyri nevndu avrik, hevur Birita Mohr virkað sum leikstjóri, rithøvundur, týðari, dramalærari, umsitari og annað.

Ein leiklutur var kortini, ið seinasta árið hevur gjørt inntrykk á dómsnevndina. Tað var leikluturin sum Olga í leikinum, Nordost, sum Tjóðpallur Føroya setti upp í heyst. Saman við Súsonnu Tórgarð og Gunnvá Zachariasen, myndaði Birita Mohr leikin um tríggjar ymiskar kvinnur, ið vóru partar av gíslatøkuni í Dubrowka leikhúsinum í Moskva. Dómsnevndin segði um avrikið:

"Birita Mohr tulkaði leiklutin sum Olga so hjartanemandi og inniliga, at tað var sum at sita undir liðuni á henni í leikhúsinum. Birita Mohr megnaði so listarliga at fáa fram vanlukkuligu støðuna á palli, sum áhaldandi broyttist frá eini løtu til aðra, og fekk áskoðararnar at kenna seg sum gíslar."

### Eg dugi einki annað

- Hesum hevði eg ikki roknað við. Hetta var øgiliga rørandi, segði Birita Mohr eftir at tað varð kunngjørt, at hon hevði fingið Ársins Herðaklapp seinnapartin í gjár.

Við Herðaklappinum fylgir ein peningaupphædd á 12.000 krónur, sum eru oyramerktir til uttanlandsferð at síggja sjónleik.

- Eg havi longu avgjørt, hvat eg skal. Eg havi ein son, sum spælir konsert í London miðskeiðis í apríl mánaði, og tá ætli eg mær at lurta. Eg havi longu keypt mær ferðaseðil, men nú havi eg so eisini ráð til at fara til hvønn sjónleik, eg vil, sigur Birita Mohr.

Síðan barnsbein hevur Birita Mohr spælt sjónleik.

- Tað er ótrúliga hart, at vera sjónleikari í Føroyum. Tað er ofta, eg havi hugsað, at hetta er ørskapur. Eg havi so roynt at gjørt okkurt annað okkurt tíðarskeið, men eg vendi altíð aftur til sjónleikin. Tað er ein sterkari kraft, sum stýrir mær. Eg dugi einki annað, sigur Birita Mohr.

Hon hevur ongar ætlanir um at gevast í bræði. Fyri hana er tað framvegis tað at bera fram eina góða søgu, sum er drívmegin.

- At siga eina søgu, sum kann røra, flyta og broyta ting. Sjónleikur kann so nógv. Tað er tað, sum er drívmegin. Mær dámdi ótrúliga væl leiklutin Olgu. Hon gjørdi eina serliga ávirkan á meg. Hana fór eg ordiliga inn í, og fekk ein sterkan boðskap fram gjøgnum hana, sigur Birita Mohr.

Saman við penginginum, fylgir ein tilevnað gríma og ein silvurnál við heiðrinum.